Hans Hansen:

# Skaðin er hendur



**Hans Hansen er glaður um niðurstøðuna hjá loftferðslumyndugleikunum, men hann kennir, at tað er gjørdur skaði á hansara persón. Hann kennir seg ikki reinsaðan, tí at tað er einki, sum hann skal reinsast frá**

FLÚGVING
*Heini S Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Eftir at tað nú er staðfest, at Hans Hansen ikki fleyg ólógliga við ferðafólkum fyrst í august, kann Hans nú endiliga anda lættur aftur. Hann fegnast sjálvandi um úrskurðin hjá Statens Luftfartsvæsen.

– Eg eri glaður um teirra niðurstøðu, men eg kenni ikki, at hetta reinsar meg frá nøkrum, tí at tað hevur ongantíð verið nakað at reinsað. Eg fleyg ikki hatta flogfarið til Føroya. Talan hevur verið um óndsinnaðar leysasøgur og vánaligan journalistikk.

– Hetta er forferdiliga harmiligt, og eg eri sera vónbrotin av sjónvarpinum fyri teirra innslag týsdagin í Degi & Viku. Hatta var sera vánaligur journalistikkur, sum hevur givið eitt ljótt bílæt av mær. Tíðindamaðurin fór sera einsíðugt í málið. Tað var skrásett í torninum, at eg ikki fleyg hatta flogfarið, og loggbøkurnar vístu tað eisini. Um tíðindamaðurin hevði viljað, hevði hann uttan trupulleikar funnið keldur, sum avsannaðu tíðindini, sigur Hans.

### Biðið um innlit

Hans Hansen er ikki vísur í, um hann fer at gera meira við málið. Hann torir heldur ikki at siga, hvar søgurnar eru komnar frá.

– Eg havi biðið sjónvarpið um eina umbering, og at teir gera eina rætting. Eg havi eisini sent eitt bræv til Statens Luftfartsvæsen, har ið eg biðið um innlit í, hvør hevur meldað tað inn.

Hann kennir alt málið sum eina persónforfylging, og hann hevur ilt við at seta seg til sættis við málinum, hóast hann nú er vorðin reinsaður.

– Tað er ein møguleiki at stevna fyri ærumeiðing, men tað havi eg ikki tikið avgerð um enn. Eg fari at fylgja við, hvat hendir.

– Eg kann einans gita, hvør hevur latið søguna út, men eg havi eingin prógv. Hatta málið fór út av proportiónum, og mítt umdømi hevur fingið skaða. Magni Arge tosar einans um, at Atlantsflog hevur tikið skaða av málinum, men eg kenni meg útspiltan. Tað kann ikki nytta nakað, at seta onnur í vánaligt ljós fyri at fáa seg sjálvan fram. Tað kemur einans ein boomerang-effekt burturúr, og tað lønar seg ofta aftur, sigur Hans.

### Veruleikin

Hans Hansen greiðir frá, hvat veruliga hendi:

– Eg fleyg eitt flogfar frá Basel til Keypmannahavn. Eg fleyg eitt annað flogfar til Føroya dagin eftir, at eg lendi í Kastrup.Vegna mjørkan býttu eg og ein annar flogskipari um flogfar, og eg fleyg eitt tómt flogfar heim. Infranetið varð tíverri ikki dagført rætt, og tí standi eg uppskrivaður fyri skeivt flogfar.

– Sjálvandi fari eg ikki at flúgva ólógligt eftir øll hesi árini. Tað skuldi verið tað síðsta, ið eg hevði gjørt. Eg vil ikki, at fólk skulu fáa eina keðiliga mynd av mær eftir øll hesi árini. Tí hevði tað verið tápuligt av mær, um eg sum mín síðsta floggerning fleyg ólógliga, sigur Hans Hansen at enda.

# SLV reinsar Hans Hansen

**Statens Luftfartsvæsen sendi tvey fólk til Føroya, sum komu fram til, at Hans Hansen ikki fleyg ólógliga. Infranetið varð ikki dagført, og tí vísti tað, at Hans hevði flogið flogfarið**

FLOGFERÐSLA
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Statens Luftfartsvæsen (SLV) sendi í gjár eitt tíðindaskriv út, har ið tað varð staðfest, at Hans Hansen ikki hevur flogið ólógliga við ferðafólki.

Niðurstøðan hjá Statens Luftfartsvæsen er soljóðandi:

»SLV har fået tilfredstillende forklaring på, at Atlantic Airways har gennemført flyvningerne den 05AUG06 og 06AUG06 på lovlig vis. SLV kan konstatere, at Hans Hansen på intet tidspunkt har fløjet kommercielt for Atlantic Airways efter at han er fyldt 65 år.«

Skrivað undir niðurstøðuna hevur Torben Jørgensen, sum er sjefur fyri »Operativ Afdeling hjá Statens Luftfartsvæsen«.

### Feilur í dagføringini

SLV hevði tvey fólk í Føroyum, sum skuldu kanna alla dokumentatión. Teir hava so funnið nøktandi upplýsingar um, at Hans Hansen ikki fleyg ólógliga.

Tina Larsen frá SLV greiðir Sosialinum frá niðurstøðuni:

– Vit sendu okkara “Operative Afdeling” til Føroya. Loggbøkurnar og skrásetingarlistin vístu okkum, at tað var ikki Hans Hansen, sum fleyg túrin úr Kastrup til Føroya. Orsøkin til, at infranetið hjá Atlantsflog vísti, at hann var flogskipari hendan túrin, er, at listin ikki er vorðin dagførdur.

# Eingin umbering

**Sjónvarpið hevur ikki móttikið nakað krav um umbering frá Hans Hansen. Vit halda ikki, at vit skulu geva honum eina umbering, tí at vit hava einki skeivt gjørt, sigur Jákup í Stórustovu**

TÍÐINDAFLUTNINGUR
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Georg Samuelsen gjørdi innslagið um kanningina hjá Statens Luftfartsvæsen av Atlantsflog, og hann heldur ikki, at hann hevur gjørt nakað skeivt. Hans Hansen leggur harðliga eftir sjónvarpinum fyri innslagið, og hann sigur, at hann hevur biðið teir um eina umbering. Men hetta vita teir í sjónvarpinum.

– Vit hava ikki móttikið nakað krav um umbering, sigur Jákup í Stórustovu, sum var redaktørur týsdagin, tá ið innslagið varð sent.

– Eg haldi heldur ikki, at vit hava nakra orsøk til at biðja hann um umbering, tí at vit hava einki skeivt gjørt. Søgan snúði seg um, at SLV kannaðu Atantsflog, og tað er ein áhugaverd søga. Vit søgdu ikki, at Hans Hansen hevði flogið ólógliga og gjørdu ikki nakra niðurstøðu. Vit høvdu ein lista, sum vísti, at Hans Hansen stóð uppskrivaður sum flogskipari á einum túri við ferðafólki, og tað hildu vit vera áhugavert, og tað hildu Statens Luftfartsvæsen sanniliga eisini, sigur Georg Samuelsen, sum gjørdi innslagið.

KRINGVARP FØROYA

Lesið Sosialin - so eru tit við